# Álit

# í

**ungdómstingsmáli nr. 1/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

Nám X , Eysturskúlin hevur lagt málið fram hin 6. februar 2012, og eftir 1. viðgerð 6. februar 2012 er tað beint í Mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. februar 2012.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya lærarafelag.

Uppskotið ger broytingar í fólkaskúlalógini, so at næmingar frá 8. skúlaári fáa undirvísing í religión. Nevndin er samd um, at tað er umráðandi, at skúlin fyrireikar næmingin í tí framhaldandi alheimsgerðini, soleiðis at hann ikki bert veit, hvat kristindómur er, men eisini veit, hvørjir allir hinir átrúnaðirnir í heiminum eru, og hvat teir snúgva seg um.

Nevndin metir at næmingurin er nóg búgvin til hesa broyting í lærugreinum, tá hann er 14-15 ár. Hetta ger eisini, at tey ungu fáa eina breiðari vitan innan hesi evni um moral og etikk, soleiðis at næmingurin ikki bert veit, hvat kristindómur er, men eisini veit, hvørjir allir hinir átrúnaðirnir í heiminum eru, og hvat teir snúgva seg um.

Nevndin vísir á, at broytingin er í samsvari við námsætlanina fyri lærugreinina, sum Mentamálaráðið hevur gjørt.

Nevndin vísir á, at Mentamálaráðið má bera so í bandi, at meira tilfar verður framleitt til fakini religión og mannarættindi/fólkarættindi.

Við hesum viðmerkingum tekur samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Mentanarnevndin, 7. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Vigdis Mellemgaard | Benjamin Rajani | Virgar Johansen |
| Egi Djurhuus | Rani Johansen | Anna Nolsøe Joensen |
| Tóri Nielsen | Sascha Due Niclassen | Mike Gaardlykke |
| | Svanna Olsen | Gutti Christiansen |